Fiskimálaráðið

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
§ 41. Øll veiða á fiskiførum undir føroyskum flaggi skal landast um bryggjukant í Føroyum. *Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um, hvørji fiskasløg, fiskaúrdráttir ella fiskiskapur, heilt ella lutvíst, ella í avmarkað tíðarskeið, eru undantikin kravinum sambært stk. 1. *Stk. 3-6.* ...	**1.** § 41, stk. 1 og 2 verða orðað soleiðis: "Veiða á fiskiførum undir føroyskum flaggi skal landast og avreiðast um bryggjukant í Føroyum, tó kunnu í mesta lagi 15% av veiðuni fyri hvørt fiskaslag sær, gjørd upp 31. desember fyri árið frammanundan, landast og avreiðast uttanlands. *Stk. 2.* Umframt undantakið frá at landa um bryggjukant í Føroyum, sambært stk. 1, 2. – 4. lið, kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um, hvørji fiskasløg, fiskaúrdráttir ella fiskiskapur, heilt ella lutvíst, ella í avmarkað tíðarskeið, eru undantikin avmarkingunum sambært stk. 1."
§ 64. Er ikki harðari revsing ásett eftir aðrari lóg, verður tann revsaður við sekt, ið: 1) brýtur § 3, stk. 3, § 4, stk. 1, § 5, stk. 2, § 8, stk. 3, 3. pkt., §§ 11-12, § 13, stk. 1, 5 og 7, § 21, stk. 1 og 3, § 23, stk. 4-6, § 25, stk. 1 og 3, § 26, stk. 1, § 27, stk. 1, § 30, stk. 1-2, § 31, stk. 1-2, § 35, stk. 1, 1. og 2. pkt. og stk. 3, 2. pkt., § 37, stk. 1, § 38, stk. 1, § 39, stk. 1, § 43, stk. 1, § 46, stk. 1 og 2, § 49, stk. 8, § 55, stk. 1, § 56, stk. 1 og 2, § 57, stk. 1 og § 61, 2)- 6) ... *Stk. 2. – 6.* …	**2.** Í § 64, stk. 1, nr. 1 verður aftan á "§ 39, stk. 1," sett: "§ 41, stk. 1,".